Fróðskaparsetur Føroya

2. juni 2006

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 4/2006

Tíð: Hósdagin 1. juni 2006, kl. 13.00-15.30

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Eivind Weyhe, vararektari og megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 3/2006 setursráðsfundi 27. apríl 2006.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarbýti 2006.** (J.nr. 0015-01595). Freistin so stutt, at deildirnar hava ikki havt tíð at gjørt neyvu framrokningarnar. Nýggj freist 9. juni. Eitt samlað uppskot verður sent deildunum til viðmerkingar í viku 24. Endaliga staðfestast á fundi 22. juni.

4. **Fíggjarløgtingslóg 2007.** (J.nr. 0015-01855). Freistin so stutt, at deildirnar hava ikki havt tíð at gjørt neyvu framrokningarnar. Nýggj freist 9. juni. Eitt samlað uppskot verður sent deildunum til viðmerkingar í viku 24. Endaliga staðfestast á fundi 22. juni.

5. **Fróðskaparsetrið og granskingin**. Drúgt kjak um raðfestingar, arbeiðsumstøður o.a. Eingin niðurstøða.

6. **Strategi frameftir.** Kjak um fleiri ymisk viðurskifti, m.a. komandi samanleggingarnar av hægri útbúgvingarstovnunum. Í sambandi við studentaupptøku varð samtykt at fáa gjørt eina kanning av, hvat studentar leggja dent á í sambandi við val av útbúgving. Setursskrivstovan kannar hvørjir møguleikar eru fyri at fáa gjørda eina slíka kanning.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

7. **Setan av Ph.d.-studentum á Náttúruvísindadeildini.** (J.nr. 0021-01794). Staðfesting av avgerð tikin millum funda. Nátturuvísindadeildin setur frá 1. juli Hilmar Simonsen, cand.scient, og frá 1. september Khanh Duc Nguyen, MSc, sum Ph.D. studentar í jarðfrøði. Setursskrivstovan og Náttúruvísindadeildin avgreiða formligu viðurskiftini í málinum.

8. **Setan av avloysara fyri Zakaris S. Hansen.** Eftir tilmæli frá Føroyamálsdeildini samtykti setursráðið at seta Kristin Magnussen í starv sum avloysari fyri Zakaris S. Hansen í eitt ár frá 1. september.

9. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 5.5.06.** (J.nr. 0011-00013). Einki at leggja afturat.
   b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 16.5.06.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.
   c. **Fundur á Føroyamálsdeildini 31.5.06.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

10. **Próvdómaragóðkenning at staðfesta. Eftir tilmæli frá Náttúruvísindadeildini er Mentamálaráðið biðið um hesa góðkenning: Carsten Juel, professari í vødda fysiologi, Institut for Molekylær Biologi og Fysiologi á Københavns Universitet til *Human fysiologi.*** (J.nr. 0026-01525). Staðfest.

11. **Ársroknskapir at góðkenna og skriva undir. Fróðskaparsetur Føroya sum sjálvsognarstovnur** (J.nr. 0016-01860) **og Grunnur Onnu Djurhuus til áminnis um Sverra Fon.** (J.nr. 0016-01861). Roknskapurnir góðkendir og undirskrivaðir á fundinum.

**Kunningarmál:**

12. **Mánaðarjavni ultimo mars 2006, nýtsla fyri alt setrið 5.622.700 kr = 29,5% av játtanarkarmi uppá 19.070.000 kr.** (J.nr. 0015-01595).

13. **Álendska landsstýriskvinnan í mentamálum, Camilla Gunell, vitjað Fróðskaparsetrið og Altjóða Skrivstovuna 17.5.06. Rektarin, setursskrivarin og Holger Arnbjerg tóku ímóti.** (J.nr. 0019-01849).

14. **Starvsfólkamál:**

   a. **Hálvtíðarskrivstovustarvið á Náttúruvísindadeildini: Beinta Arge hevur sagt seg úr starvinum pr 31.5.06. Nýtt skrivstovufólk verður Kamilla Benzon, hon byrjar hálvan august.** (J.nr. 0021-01808 og J.nr. 0023-1817).

b. **Bókavørðurin: Herluf Hansen hevur fingið játtað farloyvi í 1 ár aftrat frá 1.9.06. Unn Patursson heldur fram sum avloysari.** (J.nr. 0023-00149 og J.nr. 0023-01677).

**15. Ráðstevnur:**

a. **Innbjóðing til skeið á Hotel Føroyum 18.5.06 um Altjóðagerð og Føroyar.** (J.nr. 0056-00154).
b. **Innbjóðing til ICDE ráðstevnuna fyri rektarar og fyrisitingarstjórar "Borderless University Teaching – Cooperation and Competition" 11.-13.6.06 í Lillehammer.** (J.nr. 0057-00155).
c. **Innbjóðing frá Det Danske Ledelsesakademi til ráðstevnuna "En ny dagsorden for ledelse?" í Keypmannahavn 11.-12.2.06.** (J.nr. 0057-00155).

Frágreiðing: Annika Sølvará